## Venjarin svímaði



At tað kann vera stríggið, tá nógv stendur á, mátti annar av føroysku landsliðsvenjarunum, Rógvi Nielsen, ásanna eftir dysti móti Belgia.

Luftin í høllini í Mezzocorona var kanska nakað tyngri og heitari enn hon plagar at vera, tá dystir verða leiktir heima í Føroyum, men gjøgnum teir 60 minuttirnar, sum dysturin vardi, tóktist hetta tó ikki at bila.

Tað var ikki fyrr enn næsti dysturin var farin í gongd, og pulsurin hjá venjaranum kanska eisini var komin nakað niður, at tað gekk galið. Meðan leikarar og venjarar sótu og hugdu at næsta dystinum, gjørdist alt svart hjá venjaranum, sum ikki sjálvur dugdi at siga stórt um tað, sum fór fram.

- Alt fór bara at mala, men eg fekk so lagt meg niður, áðrenn tað gjørdist heilt svart. So var ikki annað at gera, enn verða liggjandi eina løtu við ísi á pannuni, segði Rógvi sjálvur, tá vit seinni á degnum fingu orð á hann. Og so kann skoytast afturat, at hann tíbetur sá út til at hann var komin heilt fyri seg aftur.

Hann leggur afturat, at hann ikki vist, hví hetta var hent.

- Eg havi so drukkið nokk av vætu alla tíðina, og meðan dysturin var, hevði eg tað eisini heilt fínt. Kanska var tað kortini vætumangul, ella kanska hevur tað bara verið ein kombination av hita og spenningi, segði hann at enda.

**-jm**

# Nú skal tað standa sína roynd

**Malta og Føroyar, sum tvær ferðir áður hava dystast, fara at spæla landsdyst í Føroyum mikudagin 18. august**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*



Hvør eigur eitt betri landslið í fótbólti Føroyar ella Malta. Spurningurin verður svaraður mikudagin 18. august. Týsdagin varð staðfest, at maltesiska landsliðið kemur henda vegin mitt í august. Roknað verður við, at teir koma higar mánadagin 16. august, og at teir fara av landinum aftur hósdagin 19. august. Um dysturin verður spældur á Tórsvølli ella á Svangaskarði er ikki greitt enn.

Sambært metingini hjá FIFA, so eigur Malta eitt fótbóltslandslið, sum er eitt vet betri enn føroyska liðið. Á ranking listanum, sum varð munngjørdur fyri nøkrum vikum síðani, var Malta nummar 128, og Føroyar vóru á 129. plássinum – saman við Palestina. Síðsta mánaðin hevði FIFA flutt Malta eitt pláss fram og Føroyar trý pláss aftur eftir hæli. So verður tað upp til ellivu føroyskar og ellivu maltesiskar fótbóltsspælarar at gera av 18. august, hvussu nógv skil tað er í metingini hjá FIFA.

Føroyar og Malta hava tvær ferðir áður spælt landsdyst í fótbólti. Báðu ferðirnar var í 1997 í HM undankappingini. Í báðum ferunum vunnu Føroyar 2–1. Suðuri á Malta skoraðu Øssur Hansen (brotsspark) og Todi Jónsson føroysku málini. Á Svangaskarði vóru Uni Arge og Todi Jónsson málskjúttar. Tað var hesa seinnu ferðina, at Jan C. Dam var so óheppin at fáa reyða kortið dygst eftir steðgin. Malta skoraði upp á brotssparkið, sum varð dømt í tí sambandinum. Malta royndi at trýsta, men føroyingar megnaðu at halda tørn, sjálvt um teir í try korter vóru undirmannaðir.

Tað var í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá svenska fótbóltssambandinum, at fyrrverandi FSF formaðurin, Dánjal Andreasen, og formaðurin fyri maltesiska fótbóltssambandinum, Joseph Mifsut, tosaðu um møguleikan fyri einum vinardysti. Tá ið umboð fyri FSF í næstsíðstu viku vóru á UEFA kongress á Kypros, varð evnið tikið uppaftur, og nú er staðfest, at dysturin verður í Føroyum 18. august. Maltesiska fótbóltssambandið rindar fyri ferðina til og úr Føroyum, og FSF rindar fyri uppihaldið hjá ferðalagnum, sum fer at telja 27 fólk.

# Tað gongur illa at fáa seðlarnar inn

**Uppgerðin av kvinnudeildini og 3. deild verður treytað av, hvussu óførir dómararnir verða at senda upplýsingar inn til Fótbóltssambandið**

DYSTARSKRÁSETING
*Jóannes Hansen*

Avmarkað arbeiðsorka ber við sær, at tað ikki er møguleiki fyri hjá Ítróttarsosialinum at fylgja við í, hvussu tað hevur hilnast í 3. deild hjá monnum. Vónandi fer tað at bera til at fylgja við í kvinnukappingini, sum bara fevnir um tríggjar dystir hvørja ferð.

Ætlanin hjá okkum er eina ferð um vikuna at hava upplýsingar um úrslit og málskjúttar soleiðis, sum teir eru á dómaraseðlunum, sum eru sendir til FSF.

Eftir fyrsta umfarið í kvinnudeildini vóru í gjár allir dómaraseðlarnir komnir FSF skrivstovuni í hendi. Verri stóð til í 3. deild. Har ganga dómararnir framvegis við seðlunum í buksulummanum ella í ítróttartaskuni – í hvussu so er summir teirra.

Fyri at sleppa undan mistøkum, so gera feløgini og spælararnir sær sjálvum eina stóra tænastu, um teir beinanvegin, tá ið dómarin hevur skrivað mál og málskjúttar á dómaraseðilin kanna eftir, um nú alt er skrivað rætt og soleiðis, sum tað eigur at vera gjørt.

### 1. deild kvinnur

**1. umfar**

**GÍ/B68–B36 2–8 (1–5)**
0–1: Ása Christiansen 5.
0–2: Halltóra Joensen 15.
0–3: Anja Weihe 20.
0–4: Elsebeth Jónsson 27.
1–4: Heidi Heinesen 32.
1–5: Halltóra Joensen 44.
2–5: Mai Britt Svalbard 56.
2–6: Ása Christiansen 76.
2–7: Anja Weihe 81.
2–8: Anja Weihe 88.

**KÍ–EB/Streymur 9–0 (6–0)**
1–0: Rannvá B. Andreasen 4.
2–0: Maria við Neyst 5.
3–0: Malena Josephsen 13.
4–0: Ragna B. Andreasen 23.
5–0: Rannvá B. Andreasen 26.
6–0: Malena Josephsen 27.
7–0: Malena Josephsen 63.
8–0: Rannvá B. Andreasen 70.
9–0: Vivian Bjartalíð 89.

**FS Vágar– Sumba 6–0 (3–0)**
1–0: Jóna Petra Thomsen 20.
2–0: Annika Niclasen 35.
3–0: Jóna Petra Thomsen 42.
4–0: Maria Reynstind 70.
5–0: Annika Niclasen 80.
6–0: Eivy Johannesen 87.

### 3. deild

**Fram–EB/Streymur 2–1 (0–0)**
0–1: Sigfríður Abrahamsen 48.
1–1: Rógvi Højgaard 66.
2–1: Steingrím Funding 87.

**GÍ–ÍF 7–2 (2–0)**
1–0: Magni Jacobsen 4.
2–0: Magni Jacobsen 28.
3–0: Magni Jacobsen 47.
4–0: Magni Jacobsen 61.
5–0: Heini Heinason 63.
6–0: Kaj Ennigarð 65.
6–1: John Thomsen 70.
6–2: Rúni Petersen 72.
7–2: Magni Jacobsen 89.

2. Seðlarnir, sum í gjár ikki vóru komnir á FSF skrivstovuna, vóru frá hesum dystunum í fyrsta umfarinum: SÍ–B68, Skála–HB og NSÍ–TB. Eina ferð í næstu viku fara vit at royna at siga frá úrslitum og málskjúttum í 3. deild, og tá fara vit at siga eisini at taka teir upplýsingar frá teimum dystunum í fyrsta umfarinum við, sum ikki vóru við hesa ferð – um teir tá fara at verða komnir á FSF skrivstovuna.

## Jákup nærkast superliguni

Møguleiki er fyri, at tveir føroyskir spælarar bresta saman í toppdystinum í superliguni sunnudagin. Todi Jónsson verður uttan iva við í hópinum hjá FC Keypmannahavn, og sambært heimasíðuni hjá OB kann Jákup á Borg fáa debut í hesum dystinum.

– Tað hevði veri fínt, um eg slapp at spæla. Tað er tí, at eg eri komin higar, og eg eri avgjørt ikki bangin fyri avbjóðingini, sigur Jákup á Borg við heimasíðuna hjá OB.

Hann heldur seg vera til reiðar til dyst í superliguni.

– Nú manglar mær ikki so nógv, kanska eitt sindur av dystarvenjing. Men skal eg spæla, so eri eg klárur, og royndirnar, sum eg havi fingið frá stórdystum fyri føroyska landsliðið, fara uttan iva at koma mær til góðar, sigur Jákup á Borg.

## Noreg stendur seg væl

Nógvir landsdystir í fótbólti vóru spældi í gjárkvøldið kring Europa. Ísland spældi málleysan javnleik, og Danmark vann 1-0 á Skotlandi.

Norska landsliðið vann sín sætta dyst á rað, tá ið Russland var á vitjan í Noregi. Noreg var á odda 3-0 til stutt fyri leiklok, tá ið russar fingu tvey mál.

## Týskland var eyðmýkt

Mæta týska fótbóltstjóðin, sum í farnu undankapping var í bólki saman við Føroyum, fekk í gjárkvøldið av at vita í einum landsdysti ímóti Rumenia. Týskland var aftanfyri 4-0 í hálvleikinum og tapti dystin eyðmýkjandi 5-1. Tað eru 65 ár síðani, at Týskland tapti so stórt á útivølli, og nú liggur aftur stórt trýst á landsliðsvenjaranum Rudi Vøller. Týskland er eitt av londunum, sum skal vera við í EM-endaspælinum í Portugal í summar.



UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikanarar skelkaðir av myndum úr Irak

**Seks amerikanskir hermenn eru tiknir og skuldsettir fyri harðskap ímóti irakskum fangum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Seks amerikanskir hermenn eru skuldsettir fyri at hava farið illa við irakskum fangum*
*Mynd: Reuters*

Amerikanarar eru skelkaðir av nøkrum myndum úr Irak, sum sjónvarpið CBS vísti mikukvøldið.

Ein av myndunum var av einum iraka, sum amerikanararnir høvdu tikið til fanga. Maðurin stóð uppi á einum kassa. Nakrir leidningar vóru festir í høvdið á honum, og frá hermonnunum fekk hann at vita, at datt hann av kassanum, fóru teir at avrætta hann við elektriskum stoyti.

Á øðrum myndum høvdu nakrir irakar fingið boð um at leggja seg oman á hvør annan. Teir skuldu látast, sum kystu teir hvør annan á munnin, og amerikonsku hermenninir flennandi stóðu og hugdu at.

Tilburðurin var í einum gomlum fongsli hjá Saddam-stýrinum, og myndirnar hava eisini skelkað amerikonsku herleiðsluna.

- Vit eru skelkað. Hetta eru hermenn, sum vit arbeiða saman við hvønn dag. Teir umboða okkum og ganga í sama búna sum vit. Teir hava svikið sínar felagar, segði Mark Kimmitt, sum er talsmaður hjá amerikanska herinum.

- Vit vænta, at fíggindin fer væl við okkara hermonnum, verða teir tiknir fangar, men ganga vit ikki undan sum eitt gott fordømi, kunnu vit ikki krevja annað av øðrum londum, legði talsmaðurin afturat.

Tilburðurin varð avdúkaður, tá ein amerikanskur hermaður kærdi seg um atburðin hjá sínum feløgum. Málið hevur verið til kanningar síðani, og seks hermenn koma fyri ein krígsrætt, sigur CBS.

# Flogferðafólk vorðin tyngri

**Ein kanning hjá SAS vísir, at á summum leiðum eru ferðafólkini tyngd eini átta pund í meðal seinastu árini**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Seinastu tíðina hevur skandinaviska flogfelagið SAS vigað 18.000 ferðafólk. Tey eru sjálvboðin farin á vektina, og hendan kanningin hevur víst, at í meðal viga ferðafólk á rutunum í Evropa 86 kilo, tá viðførið teirra er tikið við. Á teimum longru rutunum er meðalvektin 84 kilo. Tað merkir, at tey seinastu árini er meðalvektin vaksin umleið átta pund, sigur SAS.

Í Statens Luftfartsvæsen siga tey, at í veruleikanum er hetta ein spurningur um trygd. Tá eitt flogfar skal á flog, er tað umráðandi, at flogskiparin veit, hvussu tungt flogfarið er. Flogskiparin roknar út, hvussu nógva ferð flogfarið skal hava fyri at lætta sær á, og er flogfarið tyngri, enn hann heldur, kann tað gerast vandamikið, siga tey í Statens Luftfartsvæsen við Berlingske Tidende.

Í USA datt eitt flogfar niður, tí flogfarið vísti seg at vera tyngri, enn flogskiparin roknaði við.

## Sharon kann tapa

Tvær meiningakanningar í Ísrael benda á, at Ariel Sharon, forsætisráðharri, kann tapa atkvøðugreiðsluna í Likud-flokkinum, sum skal taka støðu til uppskot forsætisráðharrans um at leggja 21 jødiskar niðursetubygdir Gaza-geiranum niður. Hinvegin skulu bara fýra niðursetubygdir á Vestara Áarbakka takast niður.

Í einari kanning hjá blaðnum Yedioth Aharonoth siga 47 prosent av teimum spurdu Likudlimunum, at tey eru ímóti ætlanini hjá Sharon, meðan 39 prosent siga seg taka undir við henni. Blaðið Maariv hevur eisini gjørt eina kanning. Har siga 45 prosent nei, og 42 prosent siga ja.

Likud-flokkurin hjá Sharon hevur 270.000 skrásettar limir, og sunnudagin skulu teir taka støðu til ætlanina hjá forsætisráðharranum. Í einari útvarpssamrøðu í gjár segði Sharon, at tað verður ein sigur fyri palestinska leiðaran, Yasser Arafat, verður uppskotið felt. Eygleiðarar siga, at atkvøðugreiðslan snýr seg eisini um álitið á Sharon sum stjórnarleiðara.

## Sleppa til Svøríkis

Svenska stjórnin ætlaði at seta serligar tillagingarreglur fyri eysturevropearar í gildi, nú londini eystanfyri koma upp í ES í morgin, men tað vil Ríkisdagurin ikki. Tá atkvøtt varð um málið mikudagin, atkvøddu 137 tionglimir fyri at seta tálmandi reglur í gildi, men 182 atkvøddu ímóti.

Avgerðin merkir, at frá 1. mai kunnu fólk í Estlandi, Pólandi og øðrum eysturevropeiskum londum flyta til Svøríkis fyri at fáa sær arbeiði. Tað ætlaði stjórnin ikki. Uppskot hennara miðjaði eftir at seta í gildi reglur, sum skuldu avmarka møguleikarnar hjá eysturevropearunum at búseta seg í Svøríki og at fáa arbeiðsloyvi har.

Gøran Persson, forsætisráðharri, hevur fyrr sagt seg stúra fyri, at fátækir arbeiðarar í teimum nýggju ES-londunum eystanfyri fara at leita til Svøríkis. Har fara teir ivaleyst at góðtaka at fáa lægri løn enn sviar. Samstundis fáa teir rætt til pengar frá tí almenna, og Gøran Persson ivast ikki í, at hesir pengarnir fara beinleiðis av landinum. Men hetta var ikki nóg mikið til at ávirka limirnar í Ríkisdegnum.

## Stórt skattakrav

Russisku myndugleikarnir hava sent oljufelagnum Yukos eitt skattakrav upp á 21 milliardir krónur. Í oljufelagnum hava tey ongan hug at gjalda, og tey hava latið rættinum málið.

Politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at skattakravið er óveruligt, og at tað er liður í einari politiskari uppgerð við stjóran í Yukos, Mikhail Khodorkovskij, sum varð tikin fyri einum ári síðani og skuldsettur fyri svik. Khodorkovskij er ríkasti maður í Russlandi. Hann hevur fíggjað fleiri andstøðubólkar og hevur á tann hátt brotið eina óskrivaða reglu, sum sigur, at vinnulívið skal halda seg burturi frá politikki. Nú skal hann revsast, og tað er ætlanin við skattakravinum, siga eygleiðararnir við Reuters.

Týsdagin valdi leiðslan í Yukos ein fyrrverandi russiskan tjóðbankastjóra til nevndarformann. Hildið verður, at hetta er gjørt sum ein roynd at slætta sjógvin ímillum felagið og myndugleikarnar.

## Stúra fyri hevnd

Myndugleikarnir í Teilandi stúra fyri, at víðgongdir muslimskir felagsskapir fara at hevna blóðbaðið mikudagin, tá teilendskir hermenn og løgreglumenn beindu fyri umleið hundrað muslimskum uppreistrarmonnum har suðuri í landinum.

Tað hevur vakt stóran ans í Teilandi, at 32 uppreistrarmenn vórðu skotnir inni í einari mosku, og tað er serliga hesin tilburðurin, sum fær myndugleikarnar at stúra fyri hevndarálopum. Teilendski verjumálaráðharrin, Chettha Thanajaro, segði í gjár, at fleiri hundrað viðhaldsmenn hjá teimum, sum lótu lív mikudagin, eru til reiðar at hevna álopið á moskuna.

Talsmenn hjá teilendska herinum hava sagt, at hermenninir royndu at fáa uppreistrarmenninar í moskuni at leggja vápnini, men at teir sýttu fyri at gera eftir áheitanini. Tí høvdu hermenninir ikki annað í at velja enn at søkja at teimum, siga talsmenninir hjá herinum.